Arabo og Holberg á essunum hjá Óla

— Sakarmálini móti blaðstjóranum á Dagblaðnum ikki longur »tilløbsstykki«.

Væntandi fæst ein avgerð týsdagin, um málið kann loysast við semju, ella um tað skal takast upp til dóms.

Per hongur í leysari luft. Men Óli er tann sami, ásannaðu tey fáu, sum vóru á rættarfundi mánamorgunin.

Fyrr plagdi at vera fult hús, tá Óli Breckmann var stevndur í Føroya rætt at standa við ábyrgd sína sum primus motor á Dagblaðnum.

Har vóru samhugað viðhaldsfólk, meinfýsin mótstøðufólk og onnur forvitin. Varst tú ov seinur, fekst tú bert eitt vánaligt standipláss í tí lítla salinum, sum er bygdur til jura og ikki show.

Men, sum sagt, hetta var fyrr. Síðsta mánadag var Óli Breckmann aftur í Føroya rætti, stevndur fyri ærumeiðing. Og nú var ikki neyðugt at berjast um stólarnar. Fýra fólk lýddu á, av teimum bara tveir blaðmenn.



SÍÐA 10 DAGBLAÐIÐ 13. MARS 1985

"Quisling" Treholt javnaðar— ella tjóðveldissosial

Vinstrahalla pressan — ÚF og SVF sum ekkóandi papageykar — njósnaran, "quislingin" Arne Treholt.

Orsøkin er heilt einføld: Ongantið hevur eftirlætispolitik[illegible] flokkunum móti sovjettisku heimsrædisætlanunum verið [illegible] hesum intellektuella, vælklædda, smarta, útspekuleraða[illegible] ganginum, Arne Treholt.

Hevði Treholt verið føroyingur, hevði hann ligið[illegible] faldinum hjá Atla ella Karini.

"Treholt—málið, njósnara— ella pressugøla" murraði Fjúrtandi so spakført í sini royndi at minka um týdningin av hesi størstu landasvikjaragøtu í Norðurlondunum síðan Gunnar Wennerström varð avdúkaður, ákærdur og dømdur livlangt fongsul fyri at hava selt sitt føðiland til figgindan, Sovjet.

Ikki ti, Fjúrtandi hevur ikki nakra meining sjálvur. Men istaðin lænti málgagn Tjóðveldisins eina meining frá danska sosialistablaðnum Information, sum jú eisini hevur somu køku at mjølja sum eitt og hvørt annað sosialistablað.

Vit minnast, tá Fjúrtandi lænti sær eina meining [illegible] sovjetvininum Johannes Jørgensen, tá hann tung og leyp upp í argentinsku general Buenos Aires. Tá hann lænt sær [illegible] Treholt — upp í fangið [illegible] upp í fevn [illegible] eini kon[illegible] demok[illegible]

figgindaskap, sum seinru árini alsamt meiri hevur merkt uttan— sum innan rikispolitikkin hjá hesi flokki og bróðurflokkunum hansara í Norðurlond og Vesturevropa.

NÝTT ÆTTARNAVN TIL VINSTRAHALLA

Treholt—sí[illegible] leiðaratyppan[illegible] peiskum [illegible] Eitt nýtt [illegible]

[illegible] hesin sosialistiski [illegible]ing ikki hava undrast [illegible]antið um orsøkina til, at [illegible]GB er sinnað til at gjalda [illegible]ikar fúrstaupphæddir fyri [illegible]norsk verjumál?

Treholt var jú eisini ein av teimum útspekuleraðu "friðardyrunum", sum tók undir við Norðurlondum sum kjarnorkuvápnafrium øki.

Ja, hann var imillum teirra, sum vendu Arbeiderpartiet [illegible] at hann [illegible] hægri enn

SOSIALISTISKA LUFT UNDIR VEINGIRNAR

Tá Sovjet hevur hernað[illegible] okkum og Noreg, sleppa tey [illegible] helst Treholt úr spellinum, so hann sum tákn fyri stinnan og fyri trúgva tænasta kann [illegible] beysta fruktirnar av komandi sosialistiska ósundarsvki og [illegible] faa eitthvørt høgt starv sum [illegible] javnaðar— ella tjóðveldis[illegible] kommunarar í heimlandinum [illegible] ella okkurt minni provinsarí[illegible] stað.

Njósnaraformat sum sosialistiski quislingurin Treholt mugu hava ideologiska luft undir veingjunum, so teirra arbeðsháttur[illegible] hjá njósnarin Treholt [illegible] ódømi [illegible] meira skaða.

[illegible] vinstrapressan [illegible] um [illegible] alleiðis til at [illegible] henda landa[illegible]an, so hann ikki fær [illegible] vart uppihorna straff [illegible] landsins[illegible] hansara [illegible] nationalsosialisturin [illegible] Quisling fyri 40 árum síðan.

Ó. B.

p. Nielsen Waagstein

10.00: borg.sag 12/6/1985: Magistarafelagið, fh. Óli Breckmann, P/F Dagblaðið mod

Teir ganga állahálir inn og út úr feitum almennum pamparastørvum við fullari skjalaskjáttu av ideologi. Teir eru á hvørjari ráðstevnu, fylgdir av vinstrahallum tíðindamonnum sum burran.

Arne Treholt, norskur sosialistur og stúdustykki til okkara Arna Dahl, Jóannes Dalsgaard, Tummas Arabo, Paula Nielsen, o.a. hvat ideologiskari sannføring viðvíkur.

Hetta er greinin í Dagblaðnum 13. mars í ár. Magistarafelagið vil hava myndatekstin og undirstrikaðu orðini dømd deyð at vera.

Landssvíkjarar og njósnarar

Tríggir limir í Føroya magistarafelag bóðu felagið stevna Óla Breckmann, tí hann nevnir teir í sambandi við eina grein um Treholt. Greinin kann skiljast so, at teir tríggir, sambært Óla, eru landssvíkjarar og njósnarar eins og Treholt, sambært Óla. Hetta vilja teir sjálvandi ikki hava sitandi á sær og vilja tí hava rættin at reinsa seg.

Ongin teirra var í rættinum mánadagin, men Heri Kragesteen, skrivari hjá Magistarafelagnum møtti fyri felagið. Oli kom í polkaprikkasloyfuni og stórari sigar.

Heri greiddi rættinum frá, hví felagið hevur stevnt. Í greinini verða teir tríggir, Árni Dahl, Jóannes Dalsgaard og Pauli Nielsen nærmast skirdir quislingar. Alt innihaldið og tónin í greinini ger hesar menn illgrunaverdar og greinin rakar alla stættina sum heild. Hon er eitt álop á arbeiðsumstøður og umdømi. Heri legði dent á, at tað var ikki bara fyri teir triggjar, felagið vildi hava eina avgerð.

— Hetta er ikki eitt persónsmál, men eitt prinsippmál.

Essið Tummas Arabo

Óli og sakførari hansara, Jógvan Páll Lassen, royndu at gera lítið burtur úr álvarssemini, Magistarafelagið leggur í málið.

Við góðari venjing sum parlamentarikari royndi Óli at snúgva sær. Hann visti ikki, um hann var limur í Magistarafelagnum. Tey trý føroysku nøvnini eru nevnd í einari myndatekst og nú er tað einaferð so og so í blaðarbeiði. Men sjálvandi, hann tók ábyrgdina. Nakrar prentvillur eru í greinini. Kanska átti eitt spurnartekin at staðið aftan fyri . . . okkum:

»Treholt-quislingarnir eru teir, vit finna aftur aftan fyri friðargongurnar (eisini her hjá okkum)«.

Trygvi Jacobsen, sakførari hjá Magistarafelagnum, las fyri Óla eitt brot úr greinini:

»Teir ganga állahálir inn og út úr feitum almennum pamparastørvum við fullari skjalaskjáttu av ideologi. Teir eru á hvørjari ráðstevnu, fylgdir av vinstrahallum tíðindamonnum sum burran«.

— Eru hetta Árni, Jóannes og Pauli, tú her meinar við?

Óli Breckmann:

— Tað er sjálvandi ikki ætlanin. Men, um tú sigur tað, so er kanska samband.

Jógvan Páll spældi við betri kortum. Hann kravdi einfaldliga, at rætturin vísti málið frá sær. Tí magistarafelagið hevur onga heimild at vera saksøkjari í hesum málinum. Í øðrum lagi kravdi hann Óla Breckmann fríkendan.

Málið hevur ongan rættarligan áhuga fyri Magistarafelagið. Uttan mun til, hvørja avgerð, rætturin tekur, broytist rættarvenjan ikki.

Tummas Arabo var tað eina essið hjá Jógvani Páll. Tummas er eisini nevndur undir myndini av Treholt, men hann er ikki limur í Magistarafelagnum og hann hevur ikki stevnt.

— Sjálvandi, tí hann dugur at siggja, at ongin skuldseting er í greinini um landssvik og njósning. Hann kennir seg ikki raktan og hevur onga grund fyri at stevna. Tummas Arabo er ikki so erkvisin sum Magistarafelagið, segði Jógvan Páll.

Holberg gott kort

Niðurstøðan hjá saksøkta og sakførara hansara var tann, at sjálvandi var ikki ætlanin at skíra Árna, Jóannes og Paula landssvíkjarar og njósnarar, enn minni quislingar. Einasti samanburður er tann, at Treholt er vinstrahallur og tað eru teir tríggir eisini. Nú komu Holberg og Erasmus Montanus eisini á borðið, handan við steininum, sum ikki flýgur. Soleiðis: Jóannes Dalsgaard er njósnari! Tí hann er javnaðarmaður og tað er Arne Treholt eisini.

Skeivt at nevna teir

Men Jógvan Páll spældi ikki kort sini nóg væl. Sorinskrivarin vísti ikki málið frá sær alt fyri eitt. Men hann útilokaði ikki møguleikan.

Heldur ikki hevði hann hug at gera, sum Trygvi vildi: seta Óla í varðhald.

Men hann kom við einum semingsuppskoti. Óli átti ikki at drigið teir tríggjar upp í greinina. Tað hevði hann onga sum helst grund til og tað er óheppið, hann gjørdi tað.

— Eg dugi ikki at siggja, hví hann skal leggja eftir teimum, tá hann onga grund hevur til tess, segði sorinskrivarin. Hann kom tí við tí uppskoti, at Óli skuldi harmast um hetta.

Partarnir umhugsaðu semingsuppskotið eina løtu og komu so aftur. Trygvi bað um at sleppa at svara á næsta rættartingi. Jógvan Páll hevði skrivað eitt nýtt uppskot:

»Greinin er ikki ætlað at skíra nakran føroying landssvíkjara. Óli Breckmann harmast um, at teir tríggir hava tikið orðalíðið í greinini at sær«.

Hetta dámdi sorinskrivaranum ikki heilt. Tí skal hetta skiljast so, at sekur er tann, sum at sær tekur, spurdi hann.

Ongin avgerð fekst, men málið verður tikið fram aftur á næsta rættartingi, tað er týsdagin.

Og so fóru partarnir út aftur í veturin, har minusstigini vóru færri enn millum teir inni í Dómhúsinum.

hd

Tit ringja



Vit skriva